VIÐMERKINGAR

# Okkurt skulu tómar hendur gera

## *Tá farið verður eftir manninum heldur enn bóltinum*

**Bjarni Djurholm**



Tað er ikki øllum man skal svara, men tá formaður tjóðveldisfloksins í bløðunum í vavstri av konspiratiónsteorium og selektivari søgufatan rippir beinini undan politiskum starvsfeløgum aftanífrá, avdúkar hann, at politiska gerandisfagurlætnið er í andsøgn við veruligu valdsfatan hansara - nakað, sum fleiri av partamonnum hansara eisini munnu hava sannað.

Í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark og m.a. um leiklutin hjá undirritaða í hesum sambandi, hevur tjóðveldisformaðurin rúgvu av ósakligum ákoyringum um svikaráð. Tí hesar viðmerkingar úr rúgvuni:

Í fyrireikingunum og samráðingunum um fullveldi í 1999 og 2000 átti undirritaði lítlan og ongan lut. Undirritaði var frá endanum av 1999 til á ólavsøku 2000 í stóran mun burtur úr politikki orsaka av sjúku.

Seinast í august 2000 gjørdist undirritaði so landsstýrismaður. Sambært gerðabók landsstýrisins fyri heystið 2000 var full undirtøka í landsstýrinum um samráðingarleistin til fjórða samráðingarumfar, sum var 26. okt hetta árið. Einki kom heldur burturúr hesum umfari m.a. tí danir noktaðu at góðtaka sjálvsavgerðarrætt okkara sambært altjóðarætti.

14. februar 2001 var í landsstýrinum til viðgerðar m.a. uppskotið um fólkaatkvøðu um viðurskiftini millum FO og DK, har løgmaður boðaði frá, at hann ikki helt tað vera skilagott at halda fólkaatkvøðuna, tá stórur partur av føroyingunum tulkaði støðuna sum danski forsætismálaráðharrin.

Av hesum stóðst mikið rumbul frá tjóðveldinum við øsingarfundi á Vaglinum í Havn. At løgmaður mundi hava fólkið við sær sást skilliga av teirri undirtøku, hann hevði millum manna um hetta mundið. Eini 30 - 40% ynsktu hann sum løgmann. M.a. eisini annarhvør tjóðveldismaður!!

**Semja um leistin**

6. mars 2001 var "Uppskotið um sjálvstýri Føroya Fólks" fyri á landsstýrisfundi. Full undirtøka var fyri uppskotinum, sum var samtykt í Løgtinginum 20. apríl 2001.

1. mai 2001 tók landsstýrismaðurin í sjálvsstýrismálum upp málið um samskipan av yvirtøkum. Full semja um málið. Einastu, sum tó yvirtóku vóru landsstýrismenninir í fiski- og vinnumálum.

Restina av 2001 var eingin politiskur tvídráttur í landsstýrinum um tilgongdina í viðurskiftunum millum FO og DK. Eisini hetta er sjónligt í gerðabók landsstýrisins.

Á landsstýrisfundi 9. januar 2002, kunnaði løgmaður um vitjanina hjá forsætismálaráðharranum og greiddi frá ætlaðu leiðini mótvegis donsku stjórnini. Í gerðabókini sæst, at leisturin nú var, at **"....øll mál kunnu yvirtakast uttan tey, sum eru tengd at fullveldinum....".**

Á hesum fundi vóru allir landsstýrismenn tjóðveldisfloksins, íroknað formaðurin. Hansara ískoyti á fundinum var bert, at hvør landsstýrismaður sær skuldi mótvegis forsætismálaráðharranum taka tey yvirtøkumál upp, sum viðkomandi arbeiddi við. Sama sjónarmið sum 1. mai árið fyri. Sostatt var full semja um leistin.

Annars er at siga, at hesin møguleiki at yvirtaka øll mál uttan tey, sum vóru tengd at fullveldinum, longu varð umrøddur á landsstýrisfundi 31. oktober í 2000, uttan at tjóðveldið tók frástøðu frá hesum.

14. januar 2002 undirskrivaðu løgmaður og forsætismálaráðharrin felagsyvirlýsing, sum var soljóðandi:

a) *"Regeringen er indstillet på at samarbejde om Landsstyrets ønsker om overtagelser af yderligere sagsområder inden for grundloven og rigsenhedens rammer".*

b) *"Regeringen og Landsstyret vil efter Landsstyrets ønske indlede forhandlinger om overtagelse af de sagsområder, som hjemmestyreloven ikke giver mulighed for, med henblik på politisk stillingtagen. Regeringen vil på dette grundlag medvirke til at skabe et lovgrundlag for disse sagsområders overtagelse."*

Henda yvirlýsing bygdi á semjurnar í landsstýrinum undan vitjanina hjá Anders Fogh. Hon var sostatt eitt nýtt vegamót og formaður tjóðveldisfloksins skýrdi hana eisini upp í saman sum 7-mílafetið móti fullveldinum. At hann nú tekur frástøðu eru tí berar eftirrationaliseringar.

Sum framhald av felagsyvirlýsingini skrivaði tjóðveldið eisini aftaná løgtingsvalið í apríl 2002 undir nýggja samgonguskjalið 6. juni 2002 við hesum orðaljóði:

- ***"Endamál samgongunnar er, at Føroyar gerast sjálvbjargnar, so Føroya fólk uttan fíggjarligar og umsitingarligar bindingar kann gera av framtíðarstøðu sína. Samgongan hevur sum grundarlag, at Føroya fólk er tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti og er samd um í eini tryggari sjálvstýristilgongd í valskeiðnum 2002-2006 at virka fyri:***

- ***at tað verður Løgtingið, sum ger av, at øll málsøki, undantikið tey, sum eru knýtt at suverenitetinum, kunnu yvirtakast sum sermál,***
- ***at har vit valda, skulu vit gjalda."***

**Tøkk til tjóðveldið**

Arbeiðið at fremja hetta samgonguskjalið í verki byrjaði beinanvegin. Nú sást í sjónarringinum, at viðurskiftini millum FO og DK fóru at koma á beint. Men nú kom órógv í tjóðveldið. Óivað tí teir vóru bangnir fyri tilverugrundarlagnum. Restin av søguni er alkend.

Fíggjarvánirnar versnaðu, so nú var ikki so stuttligt at vera við meira. Tí ráddi um at smoyggja sær burturúr. Hetta eydnaðist eisini. Tjóðveldið fekk sett seg uttanfyri undir páskotium, at teir kravdu reinleika av løgmanni.

Teir høvdu neyvan roknað við, at nýggj samgonga fór at fáa viðurskiftini millum FO og DK á beint. At friður fór at valda á økinum. Allarminst høvdu teir væntað, at "teirra" samgonguskjal fra 6. juni 2002 fór at vera fullført av øðrum. Hetta reisir sjálvsagt spurningin, hvønn leiklut skal tjóðveldið framyvir hava í føroyskum politikki? Og mann hetta ikki pína flokkin?

Samanumtikið eigur tjóðveldisflokkurin tó tøkk fyri at hava verið faddrar til yvirtøkulógini, har nýggjur sáttmáli ger greitt, at

√ ***Føroya Løgting kann gera av, at øll málsøki, undantikið tey, sum eru karmar um ríkiseindina, kunnu yvirtakast við teirri fylgju, at Løgtingið rindar fyri tær útreiðslur, ið fylgja við teimum.***

√ ***at tekur Føroya fólk við fólkaatkvøðu avgerð um, at Føroyar skulu vera fullveldisríki, koma málsøkini, sum eru karmar um ríkiseindina, undir føroyskt málsrræði.***

√ ***Harumframt staðfestir sáttmálagerðin, at Føroya fólk varðveitir sín viðføðda, ómissandi og áframhaldandi sjálvsavgerðarrætt á øllum økjum, tað verið seg í innanlendis viðurskiftum eins væl og í altjóða høpi sambært altjóðarætti.***

Ella sagt stutt, at vit kunnu fara úr ríkinum tá vit vilja, ella lata vera. Hetta var júst tað, sum samráðingarnar við donsku stjórnina slitnaðu uppá 26. oktober 2000.

Yvirtøkulógin varð samtykt í vár. Tjóðveldið atkvøddi ímóti. Atkvøddi móti semjum í landstýrinum og egnum samgonguskjali og undirskrift frá 6. juni 2002.

Minnir tí mest um projektión, nú formaður tjóðveldisfloksins í bløðunum leggur eftir undirritaða. Hetta skal tó verða honum fyrigivið.

Men tað er neyvan lætt hjá honum at liva í alsamt eftirgjørdari verð. Skilji væl, at hann kennir seg frustreraðan. At hava sett seg sjálvan uttan fyri politiska ávirkan. Bara spell, nú andarhald tykist at vera í flokki hansara, at so verður langað eftir øðrum. At farið verður eftir manninum heldur enn bóltinum.

Men okkurt skulu tómar hendur gera.

# Herfyri blivu 60% av partabrøvum í P/f Vesturvón selt

**Fríðgerð á Mýrini**
*nevndarlimur í P/F Vesturvón*

Ikki kann sigast annað enn at sølan av hesum partabrøvum hevur havt stóran negativan »áhuga« í Vágoynni. Nógv hevur verið at sæð, hoyrt og lisið í fjølmiðlunum um søluna, men bert tann eini parturin hevur verið frammi. Tískil skal her verða greitt frá gongdini í málinum.

Tann 17. august kl. 15.00 fór nevndarlimurin, sum umboðaði størsta partin av partabrøvunum 25,85% í P/F Vesturvón út á skrivstovu felagsins og boðaði reiðaranum frá, at hann ynskti at selja síni partabrøv.

Hann varð spurdur av reiðaranum, um hann hevði nakran keypara, og svarið til hetta var nei, men um ongin keypari var, ja so ætlaði hann sær út at leita eftir einum keypara. Og so var.

Á nevndarfundinum tann 5. september varð greitt frá, at nú var keyparin funnin. Enn var einki endaligt avgreitt, men ætlanin var at selja okkara partabrøv. Framvegis varð einki ynski sett fram, av hinum nevndarlimunum um at keypa partabrøvini.

Tískil varð hildið áfram og eftir nevndarfundin vóru vit 7 partaeigarar, ið lótu partabrøv okkara selja eitt samdøgur eftir nevndarfundin.

At vit avgjørdu at selja okkara partabrøv í loyndum, og at reiðarin visti púrasta av ongum fyrr enn sølan var framd, sum hann pástendur í Sosialinum frá 10. september 2005 er púra burturvið.

Eg havi sitið í nevndini hjá P/f Vesturvón í meira enn 20 ár, og nú eg fekk at vita, at einasti núlivandi av stovnarnum vildi selja, fór eg at hugsa um hesa støðu. P/F Vesturvón hevur øll árini verið ein familjuogn, men var tað sum so ikki longur. Alt var vorðið so smábýtt, partaeigararnir vóru vorðnir so nógvir í tali og fleiri á veg og við tí óiva eisini fleiri meiningar.

Eg veit, at pápi mín Jóhannes Niclasen sáli, sum tók stig til at stovna felagið, hevði ikki góðtikið gongdina í felagnum, sum hon hevur verið hesa seinastu tíðina. Við tí í huga tók eg avgerðina um at selja míni 3,60%, og fyri mítt viðkomandi var avgerðin røtt.

Hendan túrin eru 27 mans við Vesturvón, harav 9 sørvingar. Næst síðsta túr vóru 36 mans við, harav 14 sørvingar.

Eftir í felagnum vóru sostatt 40% av partabrøvunum, harav átti reiðarin 18,65%. Nevndarlimirnir høvdu møguleika at verið sitandi í felagnum og havt ta ávirkan teir nú einaferð kundu fingið _ ella at sitið við ongari ávirkan, soleiðis sum »vit« hava sitið tey síðstu árini. Teir valdu tó eisini at selja síni partabrøv beinanvegin, tí teir sjálvir ongan persónliga ávirkan komu at fáa í felagnum framyvir.


